## Trygdarskeið til fótbóltin

Øll feløg í Formuladeildini skulu hava síni trygdarumboð, hvørs uppgáva er at halda trygdina í hásæti í sambandi við at dystir í ovastu mansdeildini verða spældir. Sambært UEFA loyvisskipanini skal FSF á hvørjum ári geva hesum umboðunum eina dagføring av, hvørjar broytingar eru á økinum, og hvørji krøv verða sett til trygdarvørðarnar kring leikvøllin.Týskvøldið vóru trygdarvørðarnir savnaðir í FSF húsinum, har Virgar Hvidbro og Lassin Isaksen frá FSF-umsitingini greiddu teimum frá, hvat væntað verður av teimum í sambandi við trygd á og rundan um leikvøllin.



## Nikolina og Bára tær lekrastu

Triðja umfarið í kappingini um at finna lekrasta spælaran í Sunset-kappingini varð í Pink-sendingini á Rás2 í gjár. Hesa ferð var tað hjá VB og VÍF, at spælararnir skuldu finnast, og her gjørdist úrslitið, at Bára Mortensen hjá VB og Nikolina Eyðbjørnsdóttir hjá VÍF vórðu valdar til finaluna. Finalan, har lurtarar við SMS-atkvøðum gera av, hvør er lekrasti spælarin, verður í Pink-sendingini komandi mikudag. Og stendur valið millum Randi S. Wardum (Kyndil), Ninnu K. Johansen (StÍF), Ásu á Neystabø (Neistin), Duritu Christophersen (Stjørnan), Báru Mortensen (VB) og Nikolinu Eyðbjørnsdóttir (VÍF).

ÍF-Skála:

# Hýrurin er góður í báðum legunum

**Setningurin fyri árið er tann sama bæði hjá fuglfirðingum og skálamonnum, sum eisini hava tað til felags, at teir fingu fulla úrtøku síðsta sunnudagur**

**FÓTBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Felags fyri ÍF og Skála er, at spádómarnir undan kappingarbyrjan um avrikini og úrslitini ikki vóru nakað serligir. Bæði liðini hava verið roknað at vera millum tey mest uppløgdu at flyta niður í næstbestu deildina. Tí er setningurin bæði hjá ÍF og Skála í fyrstu atløgu at sleppa undan teimum báðum aftastu plássunum.

Tað er eisini felags fyri hesi bæði liðini, at tey í vikuskiftinum vunnu fulla úrtøku. Fuglfirðingar hava í góðveðrinum sólað sær í,



*Bæði Skála og ÍF vunnu seg úr botninum við sigri seinasta vikuskifti. Og trý stig hesa ferð kunnu gera fótbóltssummarið munandi meira hugaligt hjá feløgunum*

at teir fríggjakvøldið fyri fyri fyrstu ferð síðani 1980 vunnu á Sarpugerði, og skálamenn hava fegnast um, at teir á heimavølli vunnu øll stigini ímóti KÍ.

Loyvini hjá nýggja ÍF venjaranum vóru ikki komin upp á pláss fyrrapartin. Tá bendi alt á, at tað aftur hesa ferð verður Roy Róin, sum fer at hava ábyrgdina á beinkinum ímóti Skála.

Allir teir, sum vóru við til at vinna søguliga ÍF sigurin á Víkingi – fyri fyrstu ferð í Sarpugerði í 28 ár – eru tøkir hesa ferð. Harafturat er Alexander Jovecic tøkur. Hann var leikbannaður fyri viku síðani.

Á Skála er sama fólkið tókt, sum var á dómaraseðlinum, tá ið skálamenn vunnu ímóti KÍ. Ta ferðina skifti John Petersen seg sjálvan inn, tá ið ein løta var eftir at spæla. Tá kom beinanvegin meiri friður og snið yvir spælið.

John Petersen verður aftur hesa ferð á dómaraseðlinum. Hann verður neyvan ímillum teir fyrstu ellivu, men tað kann neyvan útilokast, at hann fer at gera sær sjálvum størri leiklut hesa ferð, enn hann hevði ímóti klaksvíkingum.

### Dystir um vikuskiftið

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 19.04 | B68-NSÍ | Petur Reinert |
| 20.04 | KÍ-HB | Páll Augustinussen |
| 20.04 | B71-EB/S | Rúni Gaardbo |
| 20.04 | B36-Víkingur | Ransin Djurhuus |
| 20.04 | ÍF-Skála | Jens Petur Brattalíð |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 19.04 | TB-NSÍ | Rói Jacobsen |

**Steypakappingin kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 18.04 | KÍ-VB/S | Marner Olsen |
| 18.04 | Skála/B71-B36 | Alex Troleis |
| 18.04 | AB-Víkingur | Johan P. Mikkelsen |
| 18.04 | HB-B68 | Milan Cimburovic |

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 11 | 1 | 10 | 6 |
| 2 EB/S | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 7 | 1 | 6 | 6 |
| 3 B36 | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 5 | 1 | 4 | 4 |
| 4 NSÍ | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 5 Víkingur | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 4 | 2 | 2 | 3 |
| 6 ÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 1 | 4 | -3 | 3 |
| 7 Skála | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 3 | 9 | -6 | 3 |
| 8 B71 | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 1 | 5 | -4 | 0 |
| 9 B68 | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 2 | 7 | -5 | 0 |
| 10 KÍ | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 1 | 6 | -5 | 0 |

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 10 | 0 | 10 | 6 |
| 2 VB/S | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 12 | 3 | 9 | 6 |
| 3 07 Vestur | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 10 | 5 | 5 | 6 |
| 4 AB | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 10 | 4 | 6 | 3 |
| 5 Víkingur | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 6 HB | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 7 NSÍ | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 3 | 4 | -1 | 0 |
| 8 B68 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 9 KÍ | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 2 | 14 | -12 | 0 |
| 10 EB/S | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 14 | -14 | 0 |

# Svensk bók um føroyskan fótbólt

**Sviin, Søren Flink, hevur skrivað bók um føroyskan fótbólt**

**FÓTBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan er um eina útgávu, sum íalt rúgvar 162 síður, og har svenski rithøvundurin lýsir Føroyar við serligum atliti til føroyskan fótbólt.

Við fótbóltspartinum er talan fyri tað nógva um eina aktuella støðulýsing, har útgangsstøðið verður tikið í seinastu kappingarárunum í Formula-deildini. Men rúm er sjálvandi eisini fyri nakað av nostalgi.

Hartil tekur høvundurin eisini fleiri áhugaverd evni upp, so sum fíggjarstøðuna hjá ymisku feløgunum, útlendsku ávirkanina í Føroyum og søguna hjá føroyskum feløgum í europiskum høpi.

At enda í bókini verður eisini skrivað nakað um samfelagslið viðurskifti í Føroyum. Hetta fyri eisini at geva lesarunum eina fatan av, hvat tað er fyri eitt lítið samfelag, sum liggur her í norðara partinum av Atlantshavinum.




*Mølin á Eiði prýðir permuna á bókini, sum má metast sum eitt heldur forkunnugt ískoyti til føroyska fótbóltsumrøðu*